


Mynd: Havila

# Føroyavinur heldur at oljuvinnan er á veg upp úr aldudalinum

**Jógvan Hugo Gardar**

27.06.2015 - 12:10

Oljan.fo

Per Sævik hevur í nógv ár havt samstarv við føroyingar. Serliga kenna vit hann frá samstrarvinum við Skansi. Familjufyritøkan hjá honum, Havila Holding, hevði meir enn eina milliard krónur í yvirskoti av rakstrinum í 2014.

Nú bíðar Per Sævik eftir at oljuvinnan tekur dik á seg aftur. Hann er ikki samdur við einum øðrum norskum ríkmanni Jens Ulltveit-Moe, ið metir at oljuvinnan ikki kemur at koma upp úr verandi aldudali, men at vinnan eigur at venja seg við at oljuprísurin kemur at liggja niðanfyri 70 dollarar fatið.

LES EISINI: Tvey av hvørjum trimum í oljuídnaðinum missa arbeiðið

- Tað er trupult at siga við vissu hvussu leingi hendan kreppan kemur at halda fram, men eg rokni við at fyri flestu økini innan oljuvinnuna, so kemur støðan at batna í 2017. tá fara tíðirnar at gerast bjartari aftur, sigur Sævik í samrøðu við Dagens Næringsliv.

- Vit fara komandi tíðina at síggja at fleiri avtalur um boripallar verða uppsagdir, bæði í Noregi og aðrastaðni. Men hetta er ikki endin á oljuøldini, um nakar skuldi trúð tí, undirstrikar hann.

Um egið virksemi og egna fyritøku, metir hann at tey koma at klára seg gott framyvir, og er nøgdur við at tey hava fingið øll tey nýggju skipini sum tey hava bílagt. Hann vísir eisini á at tað er gott at fyritøkurnar hjá honum hava tryggja sær at har er nokk at gera komandi árið. Havila hevur dekka inn 80 prosent av arbeiðstíðini í frálandapartinum.

Per Sævik er virkin innan fiskivinnu, shipping og ognir